


*Joseph W. Garragher, jarðalisfrøðingur hjá Statoil her frammanfyri kanningarskipið Sea Surveyour, sum nú skal gera klárt til at bora fyrsta brunnin á basaltinum á landgrunninum*
*Mynd Bárður Lydersen*



*Joseph Garragher við Statoilskrivstovubygninginu m í baksýninum*
*Mynd Bárður Lydersen*

skilur verður arbeitt at fáa ein pall. Hóast eftirspurningurin er stórur, so skilst, at tað helst fer at eydnast at fáa ein pall til uppgávuna.

## Við frá byrjan

Joseph W. Garragher stendur fyri tí tekniska partinum av kanningunum og hitti Sosialurin hann á Vestarubryggju, har hann saman við øðrum fólkum frá Statoil var við at leggja seinastu hond á fyrireikingarnar til hesar so týdningarmiklu kanningar innan boringina næsta summar.

Joseph hevur arbeitt hjá Statoil í mong ár og hevur drúgvar royndir í oljuvinnuni, har hann eitt skifti arbeiddi í Houston. Í dag arbeiðir hann á Londondeildini hjá Statoil, har hann m.a. tekst við Føroyaøkið saman við nógvum serfrøðingum frá Stavanger-deildini. Hann hevur verið við í leitingini við Føroyar síðani ár 2000, og tí er hetta ein sera spennandi tíð fyri hann, nú heilt spildurnýggjar royndir verða gjørdar at finna oljuna undir føroyska basaltinum.

Hann arbeiddi við at gera klárt til ta fyrstu boringina eisini. Nú hann er við at gera klárt til at bora enn ein brunn við Føroyar er hann bjartskygdur. Teir arbeiði nú eftir eini nýggjari ætlan og leitimodelli, sum eru nógv øðrvísi í mun til fyrsta brunnin.

Hanna leggur aftrat, at eftir eitt drúgvt kanningararbeiði eru vit nú førir fyri at síggja gjøgnum basaltið. Sjálvur var hann við á eini ráðstevnu um basalt og seismikk í Madrid herfyri, har nýggjastu upplýsingarnir um Føroyaøkið vórðu viðgjørdir. –Vit hava nú data, sum vísa løgini undir basaltinum, har vit hava peikað út eitt ávíst øki sum serstakliga áhugavert. Hetta er tað vit kalla fyri Brugduprospektið.

Joseph Garragher vil ikki vísa aftur, at talan kann vera um at gera eitt stórt fund her, og at ein elefantur tvs. ein risastór oljukelda á oljumáli, eisini er møgulig, um heilt væl vil til. Men tað er sera torført nú at siga, hvat verður at finna av olju og gassi. Bert boring kann siga okkum hetta. Statoil serfrøðingurin sigur víðari, at kanningarnar nú eru eitt sera týðandi stig á leiðini fram móti at bora.

Talan er um ein rættiliga serstakan brunn. Oljufeløg hava áður borað gjøgnum basalt á Atlantsmótinum, men tað hevur bara verið gjøgnum sera tunn løg. Her verður helst talan um nógvar hundrað metrar. Tað er torførari at bora gjøgnum basalt enn gjøgnum vanlig løg, men Statoil hevur royndir at bora gjøgnum basalt, sum eisini koma væl við her.

## Hess helst við

Tað hevur verið frammi fyrr, at Amereda Hess og The Faraoe Partnership-samtakið fóru at leggja sín írestandi brunn frá 1. rundu saman við brunninum, sum Statoilsamtakið nú fer at bora á basaltinum. Hóast vit ikki hava fingið hetta endaliga váttað er rættiliga sannlíkt, at ein avtala verður gjørd millum tey bæði samtøkini og føroyskar myndugleikar um, at Statoilbrunnurin og Amerada Hess brunnurnin, sum feløgini bundu seg til at bora í 1. útbjóðing, verða lagdir saman til eina meira kostnaðarkrevjandi boring við tjúkkum basalti.

BP, sum eisini hevur tveir brunnar eftir at bora frá 1. útbjóðing hevur í eina tíð verið í samráðingum við Anadarko og føroyskar myndugleikar um at flyta brunnarnar inn á 9 ára loyvi sum Anadarko hevur og har bora ein brunn á basaltinum í staðin fyri teir báðar. Sum skilst er endalig avtala enn ikki gjørd, og okkurt bendir á, at hesin brunnurin neyvan verður boraður fyrr enn í 2007 m.a. vegna stóra eftirspurningin eftir boripallum.

Verður hetta úrslitið so verður bert ein brunnur boraður á landgrunninum næsta ár, og tað verður so tann eftir øllum at døma samanlagdi brunnurin hjá Statoil og Amerada Hess samtøkunum.




*Statoil Føroyar í ferð við at fylla á aftur hjá Statoil, sum nú ger seinastu kanningarnar, fínpussingina, áðrenn klárt verður at bora ein brunn á landgrunninum næsta ár*